# Frálæruforrit í rokning á byrjanarstøði

## Teldan sum amboð í verkstaðarundirvísing.

Ætlanin við okkara verkætlan er at læra børnini at nýta telduna sum eitt náttúrligt amboð í verkstaðarundirvísingini.
Teldan skal vera tann sum setur næminginum uppgávuna og boðar frá, um svarið er rætt.

Arbeiðsgongdin skal vera sum á vanligum arbeiðsplássi har í ein partur av svarinum liggur uttan fyri telduna, so næmingurin ikki alla tíðina situr frammanfyri telduna, men verður noyddur at brúka aðrar sansir enn sjónvørpsansina, fyri at loysa uppgávuna rætt.

Hvussu fáa vit telduna inn sum ein natúrligur partur av verkstaðarundirvísingini í støddfrøði ?
*Í flestu forritum vit kenna, eru næmingarnir bundnir at telduni alla tíðina.*

Hvussu læra vit børnini at brúka telduna sum eitt vanligt arbeiðsamboð ?
*Á nógvum arbeiðsplássum er teldan eitt hjálparamboð og ikki eitt mál í sær sjálvum.*

Hvussu flyta vit arbeiðsgongdina millum teldu og nakað ítøkiligt ?
*Royna at gera næmingin til ein meira "aktivan" teldu nýtara .*

Hvussu teldan sum amboð kann avlýsta undirvísaran og seta krøv til næmingin ?
*Við einum einfaldum undirvísingarforriti, sum gevur næmingunum møguleika at arbeiða sjálvstøðugt uttan alla tíðina at rópa eftir hjálp.*

Arbeiðsgongd okkara.
*Við ein trilvandi byrjan, sum vardi líka til heystfrítíðina, funnu vit fram til henda leistin, vit hava brúkt, sum í høvuðsheitinum gongur út uppá, at samantvinna teldu og ítøkiligt tilfar.*
*Vit kenna einki annað undirvísingar forrit, sum byggir á sama leistin, ið vit hava brúkt, so her mátti veltast úr nýggjum.*
*Forrit okkara er ikki nakað liðugt prosjekt, men má metast sum ein betaútgáva, sum tó er stór nokk til byrjunarundirvísinga ( gott og væl 800 arbeiðssíður), við tíðini eru komin fleiri og fleiri hugskot, men tíðin hevur avmarkað uppgávuna. Forritið er*

*málrættað til brúk í verkstaðarfrálæru í fyrsta flokki fyrst og fremst, men kann eisini nýtast í hægri flokkum og til serundirvísing.*
*Møguleiki er framhaldandi at byggja meira omaná.*

**Ljóð.**
*Vit hava lagt ljóð inn á uppritið, men eftir okkara metan er ljóðið ikki neyðugt í flestu førum, og í summum førum beinleiðis órógvandi, tá havt verður í huga, at tað sita fleiri bólkar av børnum og arbeiða við ymiskum uppgávum í sama rúmi. Børnini skulu helst arbeiða fleiri saman, so oyrnatelefonir kunnu ikki nýtast.*
**Knøttar.**
*Vit valdu at hava so einfaldar og fáar knøttar sum møguligt, grundað á tað áskoðan, at knøttarnir ikki skuldu verða nakar trupulleiki hjá næmingunum, men líkjast og hava somu funktión alla tíðina. Summar av knøttinum hava vit valt at gera við myndum, so lætt er hjá børnum at síggja, hvør uppgáva goymir seg aftanfyri.*
**Myndir.**
*Vit hava valt at brúka nógvar myndir, bæði á knøttum og sum motivation fyri at loysa uppgávur. Myndirnar eru allar úr føroyskum umhvørvi, so brúkarin skal kunna kenna seg aftur.*
*Eisini hava vit brúkt tekningar, har børn í fyrsta flokki hava teknað meginpartin.*
*Hugskotið aftan fyri nýtsluna av myndum og tekningum á knøttinum er at sleppa undan skrivaðum teksti, sum børn í fyrsta flokki ikki skilja.*
**Uppseting.**
*Vit hava roynt at hava havt síðurnar so einfaldar við fáum knøttum, so næmingarnir ikki verða órógvaðir teimum.*
**Evnir.**
*Vit hava roynt at viðgjørt øll tey evnir, sum koma fyri á byrjunarundirvísing í støddfrøði, t.d. telja, máta, viga, pening, mongdartøl, vídd, størri enn, minni enn ella javnt við, samanlegging, frádrátt v.m.*

**Roynd (test)**
*Forritið er roynt í einum 1. flokki, so hvørt sum tað hava bygt tað upp. Eftir royndirnar eru ymsar tillagingar gjørdar. Vit hava roynt at hugt eftir, hvussu børnini arbeiða við forritinum og lagað tað eftir teirra tørvi ella arbeiðslagi.*

Okkara verkætlan byggir á, at næmingarnir helst arbeiða í bólkum, men kann eisini nýtast av einum einstakum næmingi og er vælegnað til serundirvísing.

Tá vit valdu at gera hetta forrit, var tað við tí fyri eyga, at royna at tvinna saman telduna við nakað ítøkiligt, so arbeiðshátturin verður lagaður so, at samarbeiðið er

neyðugt og natúrligt og at samskiftast má í bólkinum samstundis sum so nógvar sansir vera nýttar í innlæringini sum møguligt, so sum sjón, føla , hoyra, rúm o.s.fr.

Eisini høvdu vit í huganum at læra næmingarnar at samstarva, læra teir at síggja, teir hava brúk fyri hvørjum øðrum og vitan teirra, læra at telja og kenna sambandið millum mongdarhugtakið og talteknið, læra at skilja mongdir, hvat er meira ella minni, kenna til at keypa og nýtslu av peningi, leggja saman og trekkja frá v.m.

Royndir okkara hava víst, at hesin framferðarháttur ber væl til, - næmingarnir samskifta og arbeiða sjálvstøðugt.

Forritið er sera væl egna at brúka í samband við verkstaðarundirvísing, tí dentur er lagdur á at næmingarnir skulu klára at arbeiða sjálvstøðugt, uttan alla tíðina at spyrja, við tað at allar rokni síðurnar eru so líkar hvørja aðrari, men tó við ymiskum úrslitum, sum viðføra fjølbroytta hugsan.

Ætlanin við okkara verkætlan er at læra børnini at nýta telduna sum eitt náttúrligt amboð í verkstaðar undirvísingini.
Teldan skal vera tann sum setur næminginum uppgávuna og boðar frá, um svarið er rætt.

Arbeiðsgongdin skal vera sum á vanligum arbeiðsplássi har í ein partur av svarinum liggur uttan fyri telduna, so næmingurin ikki alla tíðina situr frammanfyri telduna, men verður noyddur at brúka aðrar sansir enn sjónvørpsansina, fyri at loysa uppgávuna rætt.

Arbeiðshátturin vit hava brúkt í 1. flokki er:

- Næmingarnir arbeiða í bólkum tveir ella fleiri
- Ein situr við telduna og finnur fram uppgávuna til hinar í bólkinum
- Hinir leita í tí ítøkiliga tilfarinum og finna svarið
- Tann við telduna skrivar svarið, er tað rætt, sleppa teir víðari, men er skeivt, má roknast av nýggjum.

Burtur úr hesum er komið nógv samskifti, har næmingarnir hava lært at hugsa sjálvstøðugt, skilja millum tað skilagóða og tað minni skilagóða og soleiðis læra av hvørjum øðrum. Tær torføru uppgávurnar hava viðført nógv prát næminganna millum, sum hevur givið teimum nógvar royndir at byggja víðari á.
Sjálvandi skulu næmingarnir skifta so ikki altíð tann sami næmingurin situr og ger tað sama alla tíðina.